# **Nýtt fiskaslag** skrásett **við Føroyar**



**Lise helen Ofstad**
lívfrøðingur

Ein sjálsamur fiskur, *Melanonus zugmayeri*, varð fingin á rannsóknartúri á djúpum vatni við Magnusi Heinasyni í september 2016.



*Melanonus zugmayeri. Skræða og fjarðar eru illa farnar eftir at vera drigin upp við troli av 820 metra dýpi. Á tekningini í høgra horni sæst, hvussu fjarðarnar upprunaliga hava verið.*

Sjáldsami fiskurin í føroyskum øki varð fingin á 820 metra dýpi millum Føroyabanka og Bill Bailey banka. Fiskurin var 17,4 cm langur og vigaði 26 g. Hann hevur onki føroyskt navn. Á enskum eitur hann „arrowtail“, sum kann umsetast til „ørvasporl“. *Melanonus zugmayeri* verður upp í 28 cm langur, men sjaldan meir enn 20 cm. Han er svartur á liti. Ryggfjarðarnar eru næstan samanhangandi, men teir fremstu teinarnir eru longri enn teir aftaru. Tenninar hava nálaskap og eru ójavnar í longd. *Melanonus zugmayeri* er vanligur í tropiskum og tempereraðum sjógvi, men sjáldsamur í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum. Hann livir nakað upp frá botni (mesopelagiskt) úti á víðum havi, og er at finna í Atlantshavinum, Kyrrahavinum og Indiska havinum, langt til havs.

*Melanonus*-ættin er í ætt við toskafiskar og er einasta ættin undir slektini “*Melanonidae*”.





Ovara myndin vísir *Melanonus zugmayeri* í heilum líki. Á tekningini niðanfyri sæst, hvussu fjarðarnar upprunaliga hava verið.